HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingið**

Dato: 5. oktober 2017
Mál: -/17/00741-9
Tygara skriv:
Viðgjørt:

**Løgtingsmál nr. F-002/2017: Frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í tingskipanini um Rúsdrekka- og rúsevnapolitikk Føroya**

**Frágreiðing**

**til**

**aðalorðaskiftis**

**Landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum leggur við hesum Rúsdrekka- og rúsevnapolitikk Føroya til aðalorðaskiftis**

**Harra formaður!**

Í ár eru 25 ár síðani Rúsdrekkasøla Landsins lat upp sína fyrstu sølubúð. Hetta var í november 1992. Einkarsøluskipanin var ein nýskipan av rúsdrekkapolitikkinum í Føroyum. Tó at spurningar um rúsdrekka og søluhættir viðhvørt hava stungið seg upp í Løgtinginum, hevur einki yvirskipað orðaskifti verið síðani, sum hevur viðgjørt mongu tættirnar í einum rúsdrekka- og rúsevnapolitikki í eini heild. Hesum meti eg, at tørvur er á, og tí leggi eg fram málið til aðalorðaskiftis í dag.

Yvirskipaða málið við rúsdrekka- og rúsevnapolitikkinum er at minka um skaðiligu árinini, sum rúsdrekka- og rúsevnanýtsla hava fyri hin einstaka; fyri næstingar og samfelagið. Hendan orðing er almenn og samsvarar við endamálsorðingina í rúsdrekkalógini.

Hóast hugsanir og hugburður til rúsdrekka er ymiskur millum manna, so eru flest øll samd um, at ovurnýtsla av rúsdrekka er av tí ringa; fyri sjálvan teg, heilsu tína og tínar møguleikar at fáa gerandisdagin við arbeiði, børnum og parlagi at hanga saman. Tað er nokkso einfalt, tí vandin fyri sjúku og skaða gerst størri, tess meiri tú drekkur. Rúsdrekka er krabbaelvandi, og ov nógv rúsdrekka kann hava við sær maga-tarmsjúkur, hjarta-æðrasjúkur, livrasjúkur, angist og tunglyndi. Í frágreiðing hjá Heimsheilsustovninum verður mett, at ovurnýtsla av rúsdrekka kravdi lívið á 3,3 mió. menniskjum í 2014, sum svarar til um 6 prosent av øllum deyðsføllum hetta árið.

Hagfrøðiliga er trupult at gera upp, hvussu nógv skaðiligu árinini av rúsdrekka kosta føroyska samfelagnum árliga. Men í Rúsdrekka- og rúsevnapolitikki Føroya frá 2015 vísir ein leyslig meting, at samfelagsligi kostnaðurin er um 60 mió. krónur árliga. Eitt er krónur og oyru, eitt annað

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

eru mongu menniskjaligu avleiðingarnar og neiligu árinini á lívsgóðskuna, bæði hjá tí rakta og hjá familjuni. Og tað er minst líka álvarsamt.

Ovurnýtsla av rúsdrekka hevur oyðilagt nógvar familjur, og vit vita frá kanningum aðrastaðnis, at børn, ið vaksa upp í hesum familjum, eru í nógv størri vanda fyri at klára seg illa í lívinum. Løgreglan vísir á, at mest sum øll harðskapsmál eru í vikuskiftunum, og rúsdrekka er næstan altíð upp í.

Í ársfrágreiðingini hjá Barnaverndarstovu Føroya sæst, at í fjør vórðu 15 nýggj mál upprættað við tí orsøk, at barnið sjálvt tekur rúsevni ella rúsdrekka. Tað framgongur ikki, hvussu nógv barnaverndarmál eru, sum viðvíkja rústrupulleikum hjá foreldrum, men tað sæst, at trupulleikar við vanrøkt eru stórir, og at familjuviðgerð er týðandi partur av tí veittu hjálpini. Leggjast kann aftrat, at tøl hjá danska heilsustýrinum, sum eru endurgivin í Rúsdrekka- og rúsevnapolitikkinum frá 2015 vísa, at í 44 prosentum av teimum førum, tá ið børn verða sett heiman, er rúsdrekkanýtsla ein týðandi orsøk.

**Harra formaður!**

Vit kenna øll týdningin av góðum korum í barnaárunum og týdningin av at seta fyriskipanir í verk so tíðliga í lívinum, sum til ber. Hesa vitan skulu vit brúka. Kanningar hjá Fólkaheilsuráðnum vísa týðiligan samanhang millum til dømis vánaliga sálarheilsu, vánaliga likamliga heilsu og hvussu nógv ung fólk drekka. Mítt greiða ynski er, at vit frameftir í størri mun fara at geva kjakinum rúmd um heilsufremjan og fyribyrging í hesum høpi, heldur enn bert at fokusera upp á viðgerð aftan á, at skaðin er hendur.

Skulu vit veruliga gera mun, mugu vit tí fyrst og fremst gera alt, vit eru ment, fyri at skapa eitt barnavinarligt samfelag fyri øll. Eitt samfelag, har okkara børn vaksa upp í tryggum og mennandi korum, sum kunnu geva børnunum tað tilfeingið, sum skal til fyri at búgva tey til at møta teimum avbjóðingum, vaksnamannalívið hevur at bjóða. Tí skulu vit framhaldandi leingja barnsburðarfarloyvið og styrkja og menna heilsufremjandi tænasturnar frá Gigni. Hetta gera vit við at fáa mannað upp í skúlunum og við at fáa skipaðar vitjanir til familjurnar, meðan børnini eru millum 2 og 5 ár.

Vit skulu arbeiða miðvíst við at menna sálarheilsuna hjá børnum og vaksnum. Fólkaheilsuráðið arbeiðir við ABC fyri sálarheilsu. Hetta verður gjørt í samstarvi við kommunur, áhugabólkar, stovnar, kirkjur og samkomur umframt onnur. Endamálið er at menna tilvitskuna um týdningin av sálarheilsuni og at styrkja og menna felagsskapin við ymiskum virksemi.

Kommunurnar taka sær av at bjóða dygdargóð dagstovnatilboð, og er hetta at fegnast um. Somuleiðis vita vit, at okkara børn eru nógvar tímar uttanfyri heimið, tí okkara arbeiðsvika er tann longsta í teimum londum, vit vanliga samanbera okkum við. Eg hevði ynskt, at vit kundu fingið eina tjóðarsemju um henda trupulleika. Vit vita, at góð skúlatilboð eisini eru av stórum týdningi, og tí er samstarv við skúlaverkið alneyðugt. Ja, samstarv sum heild er neyðugt millum øll, sum varða av menniskjum og harvið hava ábyrgd og skyldu at hjálpa.

**Harra formaður!**

Tað er semja millum heilsumyndugleikar um, at alkoholisma er ein sjúka. Orsøkirnar eru samansettar og kunnu finnast í arvaeginleikum, í umhvørvinum, í sosialstøðu og- ella í sálarligum

høpi. Samanrenningin av so ymiskum orsøkum ger tað trupult at siga júst, hvør orsøkin er, at fólk gerast bundin at alkoholi.

Tí ber heldur ikki til at finna ein einstakan viðgerðarhátt ella eitt ávíst fyribyrgingarátak, sum kann gera allan munin, og sum røkkur øllum. Alneyðugt er at hugsa breitt og at arbeiða á fleiri økjum samstundis. Eisini gera samansettu orsøkirnar tað neyðugt, at vit sum land saman lyfta hesa uppgávu. Sum dømi kann nevnast, at í løtuni samstarva Almannamálaráðið og Heilsu- og innlendismálaráðið við fleiri aðrar myndugleikar um at fáa skipað eitt heildartilboð til ung við víðfevndum trupulleikum, har rústrupulleikar eru ein partur av avbjóðingunum, sum tey ungu hava. Hetta eru ung, sum í dag einki nøktandi tilboð hava.

Tvørfakligt og tvørgeiraligt samstarv er neyðugt, um skal tað eydnast okkum at gera nakað munagott á rúsdrekka- og rúsevnaøkinum. Hetta bæði í mun til fyribyrging og í mun til viðgerð. Eisini her mugu stjórnarráðini samstarva, stovnar mugu samstarva og fakbólkar mugu samstarva. Fyri at vit fáa lyft hesa uppgávu í felag, fari eg at taka stig til at styrkja skipaða samstarvið millum ymisku ráðini og avvarðandi myndugleikar á økinum betur.

**Harra formaður!**

Undanfarni landsstýrismaðurin í heilsumálum, Karsten Hansen legði á sumri 2015 fram ein politikk vegna táverandi landsstýrið. Í politikkinum eru 28 tilmæli um átøk á økinum. Nógv flestu átøkini snúgva seg um rúsdrekka, men eisini eru nøkur tilmæli um átøk um, hvussu vit styrkja stríðið móti rúsevnum. Tað er hesin politikkur, sum eg vegna landsstýrið nú ynski aðalorðaskifti um.

Eg taki undir við flestu tilmælunum frá 2015, og nøkur eru eisini longu framd við góðari hjálp frá Løgtinginum. Samstundis eru nýggir átrokandi spurningar, serliga um rúsevnanýtslu millum ung, reistir síðani 2015, sum eg fari at taka fram í hesari frágreiðing til aðalorðaskiftis. Tað er somuleiðis mítt ynski, at vit eisini megna at flyta okkum frá, at rúspolitikkur so at siga mest hevur snúð seg um viðgerð, til eisini at viðgera heilsufremjan og fyribyrging og at hetta frameftir fær nógv størri rúmd.

Eg fari ikki at gjøgnumganga øll 28 tilmælini í mínari frágreiðing í dag. Hinvegin havi eg valt trý høvuðsøki, sum eg fari at hugsavna meg um. Tey trý økini eru týðandi fyri at røkka endamálinum við politikkinum, og snúgva seg eisini um økir, har eg sum landsstýrismaður meti, at tørvur er á broytingum og at átøk eru neyðug. Tey eru:

- Fyribyrging í breiðum høpi, herundir Rúsdrekkasølan.
- Rúsevnir og stríðið fyri einum rúsevnafríum Føroyum. Kjakið um at basa rúsevnatrupulleikanum og árinunum av hesum er av álvara kyknað. Fleiri átøk er í umbúna og mugu setast í verk.
- Viðgerð. Ein trygg og dygdargóð viðgerð er lívsneyðug fyri at lofta teimum, ið eru farin út av eggini ella eru komin út á eggina. Samstundis er peningur settur av á fíggjarlógini fyri 2017 til tvey viðgerðartilboð fyri ung. Hetta setur krøv.

**Harra formaður!**

Mótstøðan var øgilig, tá Marita Petersen, sála, vegna landsstýrið í 1991 legði fram ætlanir sínar um einkarsøluna, sum vit í dag kenna sum Rúsdrekkasølu landsins. Atfinningarnar vóru tá, at gjørdu politikarar rúsdrekka meira atkomuligt, fór nýtslan at vaksa ógvusliga. Hetta er ein vanlig læra, tá ið vit tosa um rúsdrekkanýtslu. Tað er viðurkent, at virknastu amboðini, tá ið tað snýr seg um at ávirka rúsdrekkanýtsluna og forða fyri heilsuskaðiligari ovurnýtslu, eru atkomuviðurskiftini og prísirnir.

Tey, ið vóru fyri rúsdrekkasøluni, brúktu somu grundgeving um atkomu. Tey høvdu á lofti, at royndir úr øðrum Norðurlondum vístu, at ein almenn einkarsøla var eitt gott amboð at stýra nýtsluni við, tí atkoman framvegis var avmarkað. Men kanska meira týðandi var, at táverandi skipan við skamtan hevði víst seg ikki at forða fyri rúsdrekkamisnýtslu; tvørturímóti hevði hon við sær óhepnar og ábyrgdarleysar drykkjuvanar.

Nú 25 ár seinni meti eg avgerðina at skipa eina almenna rúsdrekkasølu at vera rætta. Nýtslan av rúsdrekka er í dag á leið hin sama og kanska eitt vet lægri, enn hon var undan einkarsøluni. Í 2016 drukku føroyingar í miðal 6,3 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva, 15 ár og eldri. Hetta er hin lægsta nýtslan í Norðurlondum. Til samanberingar er miðalnýtslan í Grønlandi og Danmark, sum hava fría rúsdrekkasølu, yvir 9 litrar. Tað skal tó sigast, at tølini fyri Føroyar eru sermerkt, tí sammett við grannalondini, hava vit tann størsta bólkin av fólki, sum als ikki drekka. Tí er nærliggjandi at hugsa, at tey, sum drekka, drekka lutfalsliga meira.

Nýtslumynstrini eru eisini broytt. Vit síggja í hagtølunum frá Rúsuni, at føroyingar drekka í dag meira vín og øl, samstundis sum nýtslan av brennivíni er minkað munandi. Hóast ongar veruligar greiningar eru til taks, bendir alt á, at vit eisini drekka meira hóvliga enn fyri 25 árum síðani. Ólavsøkan, sum júst er farin framvið, er eitt lýsandi dømi um hesa broyting í, hvussu vit drekka rúsandi løg. Løgreglan sigur frá munandi færri tilburðum um harðskap, og nógv færri fólk sova rúsin av sær í varðhaldinum. Onnur sum vitja Havnina hesa høgtíð, og sum minnast hvussu tað var, merkja stóran mun: Fólk eru sum heild minni drukkin.

**Harra formaður!**

Eg eri sannførd um, at almenna einkarsølan – Rúsdrekkasølan - framvegis skal varðveitast. Gongdin talar snøgt sagt fyri hesum. Men vit skulu ikki óttast at gera broytingar innanfyri karmarnar á einkarsøluni. Einkarsølan hevur til endamáls at tálma rúsdrekkanýtsluni hjá føroyingum. Endamálið er eisini at reka virksemið á ein slíkan hátt, at krøvini hjá viðskiftafólkunum um vørur og tænastur verða rokkin.

Í roynd og veru stendur valið millum eina vælskipaða einkarsølu, sum lýkur tey krøv, ið brúkarin setur, ella eina fría rúsdrekkasølu. Um rúsdrekkasølan verður flutt frá einkarsøluni til privatar handlar, meti eg tað sera sannlíkt, at nýtslan fer at økjast og harvið eisini skaðiligu avleiðingarnar av rúsdrekkanýtsluni. Eg veit væl, at fólk eru ymisk á máli um júst hetta, og eisini í landsstýrinum eru ymiska hugsanir um júst hetta. Ymiskar hugsanir muga ikki vera ein forðan fyri kjaki, men kunnu takast við í kjakið fyri at fáa lýst málið úr ymiskum sjónarhornum. Mítt sjónarhorn er sæð úr heilsupolitiskum sjónarhorni.

Í Svøríki hava granskarar gjørt greiningar av, hvør avleiðingin hevði verið, um einkarsølan varð tikin av. Sum víst verður í Rúsdrekka- og rúsevnapolitikkinum frá 2015 hevði nýtslan verið økt við 38 prosentum, um rúsdrekkasølan varð fullkomiliga liberaliserað. Orsakað av øktu atkomuni allar tímar á døgninum alla vikuna hevði nýtslan verið økt, serliga millum tey, ið hava trupult at tálma nýtsluni frammanundan og hjá teimum ungu.

Rúsdrekka er eftir míni fatan ikki vanlig gerandisvøra. Eins og aðrar servørur eru í serligum handlum, so eigur rúsdrekka eisini at vera tað. Lat okkum tí heldur halda fast við einkarsøluna og geva henni rúmari ræsur at veita eina betri og tíðarhóskandi tænastu.

**Harra formaður!**

Javnan eru søgur í fjølmiðlum og millum manna um rúsevnamisnýtslu, serliga millum ung, í Føroyum. Søgurnar eru vanliga knýttar at stakhendingum, sum hava álvarsligar avleiðingar fyri fólk. Tær almennu ESPAD kanningarnar millum tey 15 ára gomlu vísa, at misnýtslan er væl lægri í Føroyum enn aðrastaðnis. Men rúsevnir eru í Føroyum. Føroyar er eitt samfelag í menning, og eingin orsøk er til at halda, at teir trupulleikar, sum grannalondini dragast við, ikki eisini eru hjá okkum. Tað eru fólk í Føroyum, sum misnýta rúsevnir, bæði ung og tilkomin.

Er misnýtslan í vøkstri, kunna vit spyrja. Tað er trupult at siga, men onkur ábending er um hetta. Til dømis rópaði TAKS í summar varskó í tíðindaskrivi, sum greiddi frá, at longu eftir fyrstu fimm mánaðirnar í ár høvdu tey lagt hald á tríggjar ferðir so nógv hassj, sum í 2016.

Fyri at koma svarinum nærri, kallaði eg herfyri umboð fyri løgregluna, TAKS, landsapotekaran, SSP og formannin í Fólkaheilsuráðnum á fund fyri at gera eina samlaða meting av støðuni viðvíkjandi rúsevnanýtslu í Føroyum. Mett varð, at nøgdirnar eru eitt vet vaksandi. Hetta hongur saman við einari aðrari týðandi niðurstøðu, sum er, at tey, ið innflyta rúsevnir, finna alsamt fleiri vegir og hættir at smugla. Tí er neyðugt at vera á varðhaldi. Samstundis gerast leiðirnar alt fleiri. Hyggja vit bara eftir, hvussu nógv fleiri ferðafólk fara um flogvøllin og havnir í Føroyum, so er talið fleirfaldað eftir fáum árum. Vit innflyta og útflyta fleiri vørur, og alt fleiri farmaskip eru komin í flotan. Somuleiðis eru pakkarnir við posti nógv fleiri í dag, nú fólk dagliga bíleggja vørur á netinum at flyta til Føroyar. Nøkur bíleggja eisini rúsandi evnir á henda hátt.

Tað merkir, at hóast TAKS og løgreglan, í góðum samstarvi við Apoteksverkið, veruliga hava sett sjóneykuna á stríðið móti innflutningi av rúsevnum, so er eftirlitið í roynd í veru viknað, tí talið av fólkum, skipum, pakkum er fleirfaldað um somu tíð. Tað er ein avbjóðing fyri málið um einar rúsevnafríar Føroyar, sum vit eiga at taka í stórum álvara. Tí er neyðugt at styrkja eftirlitið hjá TAKS.

Men hóast nøgdirnar, sum koma til landið, eru vaksandi, so er ilt at siga, um talið á fólki, sum misnýta rúsevnir, er hækkandi. Ymisku umboðini vístu hinvegin á, at tey, sum misnýta rúsevnir, vísa seg at hava alsamt størri og víðfevnandi trupulleikar. Tí verða avleiðingarnar meira sjónligar enn áður. Hóast bólkurin ikki er stórur, so eru trupulleikarnir ógvusligir fyri tann rakta. Sama ger seg galdandi fyri familjur og avvarðandi hjá hesum menniskjum, sum mangan eisini verða hart rakt.

Í Rúsdrekka- og rúsevnapolitikkinum frá 2015 varð víst á, at neyðugt er støðugt at dagføra regluverkið um euforiserandi evni, tí menningin gongur skjótt, og kemisku samansetingarnar broytast alla tíðina fyri at sleppa undan innflutningsbanni. Hetta er fingið í rættlag í summar, og fara vit framhaldandi at hava eitt vakið eyga við gongdini og gera neyðugar tillagingar í lóggávu um euforiserandi evni, tá tað krevst.

Samstundis sum vit eiga at gera alt, vit kunnu at forða fyri, at rúsevnir koma til landið, so mugu vit gera onnur átøk eisini. Fyrst og fremst við at fyribyrgja – og her er eitt av svarunum upplýsing og hugburðsrøkt. Tað er neyðugt, at vitanin um lívshættisligu vandarnar við rúsevnum kemur út til fólkið, serliga til tey ungu. Tí fari eg at mæla Fólkaheilsuráðnum til at seta málið á skrá í 2018.

Tað eru vísindalig prógv fyri, at tað er samanhangur millum eitt nú langtíðar tunglyndi og sannlíkindini fyri at enda í rúsmisnýtslu[1]. At rúsa seg er hjá hesum ofta ein beinleiðis avleiðing av sálarligari líðing, og tí hava átøk fyri góðum trivnaði og góðari sálarheilsu týðandi fyribyrgjandi virknað, tá ið tað kemur til rúsevnamisnýtslu.

**Harra formaður!**

Higartil hevur framløgan snúð seg um, hvussu vit fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og av rúsevnum. Tá talan er um rúsdrekka, so er høvuðsuppgávan at tálma nýtsluna og at fyribyrgja ta skaðiligu nýtsluna. Hinvegin, tá talan er um rúsevnir, er málið ein null-hugsjón.

Í hesum partinum fari eg at umrøða, hvussu vit kunna hjálpa teimum, sum eru farin um eggina, so at siga; tey, ið drekka ov nógv og tey, ið misnýta rúsevnir.

Spurningurin um rúsviðgerð hevur eisini verið á breddanum seinasta árið – sum ein partur av - og í kjalarvørrinum á almenna orðaskiftinum um rúsevnamisnýtslu millum ung. Í Rúsdrekka- og rúsevnapolitikkinum frá 2015 varð mælt til, at viðgerðartilboð til ung varð sett á stovn, tí verandi viðgerðartilboð vórðu ikki mett at vera nøktandi til børn og ung. Á fíggjarlógini fyri 2017 er játtan sett av til tvey tilboð um viðgerð til ung. Annað er viðgerðarheimið Frælsi á Eiði, sum er ætlað ungum úr 18 til 25 ár. Hitt er eitt ambulant viðgerðartilboð til ung í aldrinum 15 til 18 ár, sum Blákrossheimið skipar í Havn. Bæði viðgerðartilboðini eru undir uppbyggjan, og spennandi verður at fylgja gongdini.

Vit hava tí í dag fýra ymisk viðgerðartilboð – tvey til ung, Frælsi og Blákross, og tvey til vaksin, Heilbrigdi og Blákrossheimið. Samstundis eru eisini onnur, ið hava víst áhuga fyri at skipa serstakt tilboð til kvinnur, eins og tað verður gjørt í Íslandi. Tað er ikki ósannlíkt, at kvinnur halda seg aftur at fara í viðgerð, hóast bæði Heilbrigdi og Blákrossheimið veita tilboð um viðgerð. Í sjálvum sær er hetta eingin trupulleiki, men tess meira serstøk og smøl viðgerðartilboðini gerast, tess færri eru í viðgerð á ymsu viðgerðartilboðunum – tað setur krøv til fíggingina.

Samstundis reisir hetta eisini spurningin um, hvussu vit megna áhaldandi at tryggja fakligu dygdina á viðgerðarheimunum.

Tey viðgerðartilboð, vit hava í Føroyum, hava tað til felags, at tey eru uppbygd av eldsálum, sum hava sæð tørvin á at hjálpa sínum medmenniskjum. Hesi fólk eiga eina stóra tøkk fyri at hava lyft eina uppgávu, sum samfelagið ikki megnaði. Eg spurdi einaferð, hvat hevði hent, um tey ikki vóru her. Svarið var, at so metti mann, at 2.000 fólk, sum í dag eru edrú, ikki høvdu fingið hjálp. Viðgerðarstøðini hava gjørt eitt stórt arbeiði, og samfelagsliga nyttan er ómetaliga høg.

Tíðirnar broytast, og neyðugt er at gera sær hugsanir um, hvønn veg vit skulu fara við rúsdrekka- og rúsevnaviðgerðini. Viðgerðarstøðini hava fakfólk knýtt at stovnunum. Fleiri av viðgerðarstøðunum og borgarar hava víst á, at ynskiligt er at fáa regulerað økið betur. Hetta er eisini eitt av tilmælunum í Rúsdrekka- og rúsevnapolitikkinum frá 2015. Sum er hava vit einki lógarverk, sum regulerar viðgerðartilboðini fyri rúsdrekka- og rúsevnaviðgerð. Hetta er í andsøgn við onnur viðgerðartilboð, sum verða veitt í heilsuverkinum. Innan heilsuverkið er ásett í lóg, hvørjir borgarar hava rætt til hvørjar heilsutænastur og hvørji heilsustarvsfólk hava rætt til at útinna heilsutænastur, skipan og rakstur.

Hetta skal eisini síggjast í ljósinum av, at alsamt fleiri hava eitt blandinsgsmisbrúk og víðfevndar trupulleikar. Tað setur nýggj og økt krøv til viðgerðina.

---

[1] Sí eitt nú "Forløbsundersøgelse af 95-årgangen" hjá danska Socialforskningsinstituttinum (SFI)

Við tað, at talan er um viðgerð og eftirviðgerð fyri rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu, eigur hetta økið somuleiðis at verða regulerað í lóg við líknandi ásetingum, sum galda innan heilsuverkið. Í fleiri av grannalondunum er tað ásett í lóg, at tey, sum starvast innan misnýtsluviðgerð, skulu hava viðkomandi útbúgving. Við at áseta krøv um fakligar førleikar í lóg, ber til at hækka fakliga støðið í viðgerðartilboðunum og harvið góðskuna í teimum. Sum dømi um hetta kann nevnast, at í Íslandi hevur tað síðani 2006 verið eitt lógarkrav, at tey, sum starvast innan misnýtsluviðgerð, skulu hava viðkomandi útbúgving. Royndirnar í Íslandi eru góðar, og tað var eisini við fyrimynd úr Íslandi, at vit byrjaðu okkara viðgerðartilboð í Føroyum.

**Harra formaður!**

Tað er kent, at fólk, sum fara í viðgerð fyri rúsdrekka, í áravís hava havt eina skaðiliga nýtslu, sum ikki bert hevur havt heilsulig og sosial árin á hin einstaka, men eisini á maka, børn og onnur við. Viðgerðartilboðini, sum vit hava í dag, venda sær í størri mun til fólk, sum eru farin útav eggini, so at siga. Tað gera tey væl, men vit mugu sum samfelag gerast betri at fáa hjálpt fólki, áðrenn familja og heim eru oyðiløgd av áralangari misnýtslu.

Orsøkin er helst lutvíst atkoman. Í Rúsdrekka- og rúsevnapolitikkinum frá 2015 verður víst á, at tað kann tykjast stór avgerð at lata seg innleggja á Heilbrigdi ella Blákrossheimið fyri at fáa viðgerð fyri rúsmisnýtslu. Gáttin er høg – kanska er gáttin bara íspunnin og mental, men tað vísir seg eisini í øðrum londum, at gáttin til at leita sær hjálp er trupul at koma uppum. Skommin, tabu og stigmatisering eru eisini galdandi á rúsdrekka- og rúsevnaøkinum. Danska heilsustýrið mælir til, at sum útgangsstøði eigur ambulant viðgerð at verða bjóðað fólki við rúsdrekkatrupulleikum, og er hetta nakað, ið okkara grannalond longu gera í stóran mun. Ambulant viðgerð merkir, at tann sum er í viðgerð, ikki liggur nátt á stovninum.

Vit eiga at umhugsa, um ambulant viðgerðartilboð við fyrimuni kunnu veitast á komandi heilsudeplunum, sum verða kring landið. Av tí, at ein røð av heilsuveitingum fara at verða veittar á heilsudeplunum, kann roknast við, at tað fer at kennast minni stigmatiserandi at leita sær viðgerð har fyri rúsdrekkamisnýtslu. Av somu orsøk kann roknast við, at fleiri fara at velja at fara í viðgerð. Tað er í hesum sambandi eisini týðandi at halda fæst í meginregluna um “minst møgulig inntriv”. Tað merkir í hesum føri, at tað ikki altíð er best fyri allar rúsdrekkamisnýtarar at verða innlagdir og avbyrgdir á einum viðgerðarheimi í longri tíð. Fleiri fara tó framvegis at hava tørv á innleggjan, og tí vera viðgerðarstovnarnir eisini í framtíðini okkara álit.

Við at skipa ambulanta viðgerð kring landið, verður tað eisini meira ómakaleyst hjá bæði teimum við misnýtslu og avvarðandi teirra at taka av viðgerðartilboðunum. Sum dømi kann nevnast, at tað er høgligari hjá einum úr Sumba at fara í ambulanta viðgerð í Suðuroynni, heldur enn at ferðast norð til Havnar ella inn á Nes at fáa viðgerð. Eitt endamál í sjálvum sær er, at vit fáa veitt hesar viðgerðir tætt at, har borgarin búleikast, tá ið tað annars er fakliga ráðiligt.

Hetta snýr seg ikki um innleggjan mótvegis ambulantari viðgerð. Ikki annaðhvørt - men bæði og. Framhaldandi verða tað fólk, sum hava tørv á innleggjan, men vit fara at flyta okkum til alsamt meira ambulanta viðgerð. Hetta er longu byrjað á onkrum stovni.

**Harra formaður!**

Samanumtikið er støðan ikki so ring í Føroyum, tá ið vit tosa um rúsdrekka- og rúsevnatrupulleikar. Men fyri tey, sum vera rakt, er tað sjálvsagt sera álvarsligt. Tað eru kortini fleiri viðurskifti, ið kunnu og skulu betrast, bæði tá talan er um, hvussu vit fyribyrgja skaðiligu

árinini av rúsdrekka- og rúsevnanýtslu og í mun til at hjálpa okkara borgarum, sum hava kent sviðan av ovurnýtslu. Eg havi í hesari frágreiðing víst á nøkur viðurskifti, sum eg meti hava stóran týdning, og í Rúsdrekka- og rúsevnapolitikkinum frá 2015, verður víst á fleiri onnur.

Ynski okkum øllum eitt gott og gevandi orðaskifti um hetta so týdningarmikla mál fyri bæði einstaklingin og samfelagið alt.

Takk fyri harra formaður!

**Skjal:**

- Rúsdrekka- og rúsevnispolitikkur Føroya frá 2015

**Sirið Stenberg**
landsstýrismaður

/Turid Arge